

Mynd: solarimpulse.com

# Sólorkuflogfarið er á veg kring knøttin

**Marin Eidesgaard**

10.03.2015 - 01:59

Oljan.fo

Solar Impulse-2 er eitt heilt serligt flogfari, og túrurin, sum flogfarið byrjaði í morgun, fer at skriva søgu innan flogferðslu. Gongur alt eftir ætlan hevur Solar Impulse-2 flogið um jarðarknøttin um fimm mánaðar uttan at nýta lívrunnið brennievni. Flogfarið verður rikið bert av teimum 17.000 sólsellunum, ið sita á veingjunum.

Tað hevur tikið 12 ár at sniðgeva og byggja flogfarið. Klokkan 7.12 lokala tíð í arabiska emiratinum Abu Dhabi fór flogfarið á flog, eftir at tað varð runnið og súkklað í gongd. Tað skrivar TV2.dk.

Snarleikin er hinvegin einki at reypa av; tá ið flogfarið er fult latað upp og flýgur skjótast, er ferðin 100 kilometrar um tíman, men vanligi snarleikin er 50 kilometrar um tíman. Tískil er túrurin kring knøttin deildur upp í 12 teinar, áðrenn flogfarið er aftur í Abu Dhabi.

Fyrsti teinurin var bert 400 kilometrar, og eftir 12 tímar var flogfarið komið til Muskat í Oman og her komu fyrstu trupulleikarnir. Vindferðin var ov høg til, at man tordi at lenda flogfarið. Flogfarið er ógvuliga viðkvæmt yvir fyri vindi, tí tað vigar ikki nógv meir enn ein vanligur familjubilur.

Eftir ein hálvan tíma uppi yvir flogvøllinum var vindurin minkaður og flogfarið fekk lent.

Tann eini av teimum báðum flogskiparunum, Andre Borshberg, sum fleyg fyrsta túrin, greiðir frá, at tað verður ógvuliga spennandi, tá teir skulu flúgva yvir stóru havini.

- Vit verða noyddir til at flúgva í fimm dagar og fimm nætur á ræð, og tað verður ein avbjóðing, sigur Andre við BBC.

Hin flogskiparin, Bertrand Piccard, skal flúgva túrin í morgin.

Fylg túrinum hjá Solar Impulse-2 her.